Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?
Skriva til sunneva@sosialurin.fo

*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*



# stur

saman við tónleiki. Hesin, ið eg havi møtt, kallar seg Elezz. Hann sendir mær onkuntíð beats, sum eg spæli útyvir, og eg sendi honum løg, sum hann remiksar. Mann kann hoyra eitt remiks hjá honum av einum lagi hjá mær, ið eitur »Lost in Translation« á myspace.com/elezz. Ein genta, sum kallar seg Nacci og hoyrir til hendan tónleikahópin, syngur eisini onkuntíð útyvir tað, ið við gera.

***Hvaðani kemur tín íblástur frá?***

- Eg haldi, at eg blívi meira inspireraður av persónum enn av tónleiki. Av ymsum hendingum og støðum. Av filmum sum »City of God« og »Requiem For A Dream«. Sovorðnum, sum kemur undir húðina á menniskjum. Ofta snýr tað seg um harðskap og stoffir. Um tragiskar lagnur, sum tú, hóast tú kanska ikki hevur verið ígjøgnum júst tað sama, kanst identifisera teg við. Kanska er tað tí, at eg kenni partvís mong við tragiskum lagnum. Havi vinfólk har deyði, alkohol og harðskapur hava spælt ein stóran leiklut. Ymisk fólk, sum ikki hava verðins besta bakland, men sum hava merkt pínu og sorg. Fólk, sum á ein ella annan hátt liva ordiligt, burtur frá øllum sum eitur yvirflada.

- Eg eri eisini sjálvur blivin smá úti at koyra innímillum. Eri onkuntíð farin út á keðilig síðuspor. Tað er sum tað, ið Nietzsche segði; at tá mann roynir at berjast við ódjórið, má mann ansa eftir ikki blíva til tað sjálvur. Eg upplivdi, at eg eina løtu bleiv til ódjórið í høvdinum. Eg bleiv til tað, sum eg stríddist ímóti.

***Tit eru við at taka tónleikin upp, sigur tú. Hvussu ímyndar tú tær, at úrslitið verður, bæði sum produkt fyri seg og sum produkt í samfelagnum?***

- Eg hugsi ikki so nógv um tað. Eg hugsi meira persónligt. Um hvat eg sjálvur kann fáa burturúr. Sum listafólk mást tú skapa, annars er tað mentalt sjálvmorð; annars stagnerar tú og doyrt út. T.d hevur Makrel ligið stilt nú í tvey ár. Eg havi innsæð, at tað ikki nyttar nakað at blása í eina brostna ballón, so eg eri farin mín egna veg. Tí eg má gera okkurt kreativt og kenna á mær, at eg vaksi. At skapa er nokk á onkran hátt eitt slag av sjálvrannsakan. At vita, at ein er á lívi.

- Eg orki ikki fyri fólki við snobbutum páskaregg mentaliteti, har alt sær perfekt út á skræðuni, men er skralltómt innan. Fólk, sum møta upp til nýggjárskonsert, hóast tey ikki skilja ein pinn av tí heila, men bara møta upp vegna prestisju og liva eina óerliga og falska tilveru. Tá er tað nógv feitari við fólki, sum gera tað, tey vilja. Fólki, ið tora at traðka út um karmarnar, sum tíðin, samfelagið og normar annars seta tær. Tí tað er jú har, at øll framgongd og menning fer fram.

Hetta kemst kanska av, at eg havi ræðuliga ringt við at taka nakran myndugleika ella absoluttar sannleikar fyri fult. Eg missi beinanvegin alla virðing fyri fólki, sum seta seg hægri uttan at hava nakra orsøk til tess og siga, at so og so skalt tú liva, vera og gera. Haldi, at tað er eitt barndómstrauma frá fólkaskúlanum, ið ger, at eg havi tað so. Eg hevði ein lærara, sum eg hataði av øllum mínum hjarta. Hóast hann ikki lærdi meg nakað av týdningi, so lærdi eg, at mynduleiki ikki er = sannleiki.

- Seinni havi eg so lisið bøkur hjá Nietzsche, Richard Dawkins, Timothy Leary, Terence McKenna, Bertrand Russel o.ø. og tá fann eg útav, at eg ikki var tann einasti, sum hevði tað soleiðis.

***Hvat er tað næsta, sum er á skránni hjá tær?***

- Eg hugsi eitt sindur um at fara til Barcelona í heyst at lesa víðari. Eg havi verið har fyrr, og tað er eitt genialt stað. Fyrst og fremst er veðrið gott árið runt, men har er eisini ótrúliga vakurt og intenst listarliga sæð. Beint nú er tað tó Steso, ið fyllir mest, og hvat so kemur næst, fáa vit at síggja. Lat okkum taka eitt ting av gangin.

---

**Atlantic Soundscapes rapport:**

# Sýnisgluggi við stórari ávirkan

**Um góðar tvær vikur verður nógv umrødda sýnisglugga tiltakið Atlantic Soundscapes í Brussel, Belgia. Tað vera m.a Boys in a Band, Gestir, Guðrun og Guðrun og Marmar, ið skulu umboða føroyskan tónleik og list á tiltakinum. Sosialurin verður á staðnum og dekkar alt, sum fer fram**



*Plátufeløg í ymsum londum, sum samstarva við Atlantic Soundscapes og Christian Hald Buhl, hava víst áhuga í øllum fýra bólkunum, og tað er ivaleyst bara ein spurningur um tíð, inntil ein av teimum fær sáttmála og verður útgivin í antin Týsklandi, Sveits ella Belgia*

*Mynd av Boys in a Band: Kristfríð Tyril*

Fyri næstan tveimum mánaðum síðani var samrøða her í blaðnum við Christian Hald Buhl um sýnisglugga tiltakið, ið hann skipar fyri frá føroysku sendistovuni í Brussel saman við SamVit og Norðurlandahúsinum. Nú er tíð til eina uppdatering um, hvat er hent síðani. M.a tað, at Sosialurin fer við til Belgia at dekka tiltakið frá staðnum.

Endamálið við tiltakinum er at marknaðarføra føroyskan tónleik, list og sniðgeving. Luttakandi tónleikabólkar eru Boys in a Band, Gestir, ORCA og Budam. Myndlistaumboðini eru Marmar, Zacharias Heinesen, Heðin Kambsdal og fyri føroyska sniðgeving luttekur Barbara í Gongini við framsýning, ið m.a. umboðar Guðrun og Guðrun og Elisu Heinesen. Dennis Agerblad luttekur eisini við mótaframførslu.

## Úrslit longu nú

Hetta er fyrstu ferð, at føroyskur tónleikur og list á henda hátt verða marknaðarførd á evropeiska meginlandinum. Góðir møguleikar eru fyri, at tiltakið fer at hava við sær ítøkilig úrslit so sum plátusáttmálar, framsýningar, konsert- og festivaltilboð í Benelux londunum, umframt í Týsklandi og Fraklandi.

Longu nú sæst ein rúgva av úrslitum við tað, at onkrir av bólkunum eru bókaðir at spæla á ymsum festivalum og spælistøðum. Eitt nú skal Orca spæla á nógv viðurkenda franska festivalinum, Transmusicales, ið hvørt ár hevur komandi stjørnur á skránni. Her hava t.d Klaxons, Kaiser Chiefs, Beastie Boys og Primal Scream verið á skránni, áðrenn stóru gjøgnumbrot teirra. Umframt hetta eru bæði Orca og Gestir bókaðir at spæla tvey gigg í ávikavist Týsklandi og Sveits undan framførsluna í Brussel.

## Forvitnislig umboð á staðnum

Stóri tónleikafestivalurin Multizik í Luxemburg kemur á Atlantic Soundscapes, og um teimum dámar tað, ið tey hoyra, fara tey í ár 2009 at hava serligt fokus á fýra til sjey føroyskar bólkar á sínum festivali. Harafturat fara tey eisini at bóka ein av teimum fýra bólkunum, ið framføra til Atlantic Soundscapes, til festival teirra í ár, um tey velja at gera eina serliga føroyska útgávu í 2009.

Plátufeløg í ymsum londum hava víst áhuga í øllum fýra bólkunum, og tað er ivaleyst bara ein spurningur um tíð, inntil ein av teimum fær sáttmála og verður útgivin í antin Týsklandi, Sveits ella Belgia. Stórir showcase festivalar sum SPOT í Danmark og Nordklang í Sveits vera eisini til staðar.

Sosialurin fer tí sjálvandi við til Belgia hetta vikuskiftið. Vit fara at halda lesaran uppdateraðan við øllum, sum fer fram, m.a ígjøgnum samrøður við fólk í belgisku tónleikavinnuni, ummæli av tiltakinum og onnur viðkomandi tíðindi. Fylg við her í blaðnum og á Portal.fo í viku 19, tá tiltakið er av og úrslitið av tí verður prentað.

*Les annars meira um tiltakið á myspace.com/atlanticsoundscapes*




*Skráin inniheldur føroyska list, tónlist og sniðgeving*